# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
TLF 341800

*– Eg vil síggja andlitið á tí, sum eg tosi við. Annars er tað sum at tosa í telefon*

*Jack Straw*

# Nýtt og gott gamalt í Svøríki

**Nýggja borgarliga stjórnin í Svøríki er nú mannað.**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Nýggi svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, er 41 ára gamal, og so ungan stjórnarleiðara hevur Svøríki ikki havt síðani 1926 ella í áttati ár. Aftan á tann borgarliga valsigurin bleiv tað nevnt sum ein veikleiki, at hann er so ungur, og at leiðararnir í hinum flokkunum hava ongar royndir frá stjórnararbeiði.

Kanska var tað tí, at Fredrik Reinfeldt valdi sær fyrrverandi forsætisráðharran Carl Bildt til uttanríkisráðharra. Valið kom ikki heilt óvart á sviar, tí teir seinastu dagarnar hava fjølmiðlarnir gitt, at Bildt fór at koma upp í stjórnina.

Sjálvur segði Carl Bildt fyrrapartin, at hann gjørdist ovfarin, tá hann bleiv spurdur, um hann vildi hava uttanríkisráðharrasessin, men at hann hevði valt at taka av. Svenskir fjølmiðlar vilja tó vera við, at tað kravdi nakrar fundir at fáa játtandi svar frá Bildt.

Carl Bildt, sum er 57 ára gamal, var svenskur forsætisráðharri frá 1991 til 1994, og tað var í hansara tíð, at Svøríki fór upp í ES. Hann hevur sitið í Ríkisdegnum í 22 ár.

# Tær skulu taka slørið av

**Fyrrverandi bretski uttanríkisráðharrin Jack Straw vil ikki tosa við muslimskar kvinnur, uttan at tær taka slørið frá andlitinum.**

MUSLIMAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Jack Straw vil sleppa at síggja andlitið á teimum muslimsku kvinnunum, sum hann tosar við.*

Síðani Jack Straw fór frá sum uttanríkisráðharri, hevur hann verið limur í Undirhúsinum, sum ofta fær vitjan úr muslimskum londum. Men muslimskar kvinnur, sum vilja hava orð á hann, noyðast at taka slørið frá andlitinum, tí annars vil hann ikki tosa við tær.

– Tað má vera munur á einari telefonsamrøðu og einum práti undir fýra eygum. Fyrimunurin við einum beinleiðis práti er, at tú kanst síggja tann, sum tú tosar við, og soleiðis eigur tað at vera, sigur Jack Straw við blaðið Lancashire Telegraph. Hann leggur afturat, at hann hevur einki ímóti, at tær muslimsku kvinnurnar fjala hárið, men hann vil síggja andlitið á teimum, sum hann tosar við.

Muslimskir felagsskapir í Bretlandi halda lítið um hugburðin hjá Jack Straw.

– Eg ivist ikki í, at hann hittir fólk, sum eru í ymiskum klæðum, og eg skilji ikki, hví slørið skal vera ein trupulleiki, sigur Massoud Shadjaneh í muslimsku mannarættindanevndini í Bretlandi við AP.

## STUTT SAGT

# Bræv elvir til øði í ST

Eitt bræv, sum sudanska stjórnin hevur sent ST-trygdarráðnum, hevur fingið øði í limalondini í ráðnum.

Í brævinum skrivar stjórin í Sudan, at hon fer ikki at góðtaka, at ST sendir friðarvarðveitandi hermenn til landspartin Darfur, og stjórnin leggur afturat, at ger ST tað kortini, fer stjórnin at uppfata tað sum eina fíggindaliga sinnaða atgerð ímóti landinum.

Brævið er skrivað, tí ST hevur gjørt av at senda 20.000 hermenn til Darfur at verja sivilfólkið, sum hevur verið fyri sváreum líðingum tey seinastu árini. Upprunaliga vórðu 7.000 afrikanskir hermenn sendir til Darfur at tryggja friðin, men teir maktaðu ikki uppgávuna.

Sudanska brævið hevur serliga fingið øði í amerikanararnar, og ein amerikanskur embætismaður segði í gjár, at innihaldið í brævinum er av slíkum slagi, at tað eigur at fáa eitt »greitt svar«, sum hann tók til. Bretski ST-sendiharrin, Emyr Jones Parry, segði eisini sína hugsan um brævið:

– Eftir mínum tykki eiga vit at látast, sum at vit ongantíð hava fingið tað, segði Parry.

# Í Limfjørðin eftir olju

Danska oljufelagið Dong ætlar sær nú at vita, um olja og gass munnu vera at finna í undirgrundini undir Limfjørðinum, og felagið hevur tí søkt myndugleikarnar um loyvi til royndarboring í fjørðinum, skrivar Børsen.

Jan Terje, sum er kanningarleiðari hjá Dong, sigur við blaðið, at ein fiskimaður hevur fleiri ferðir funnið klumpar av tungari olju á botninum einastaðni í Limfjørðinum, og tað er vert at kanna hetta nærri, sigur hann.

– Vit hava ábendingar um, at tað finnast kolbrintir í undirgrundini undir Limfjørðinum, sigur leitingarstjórin við Børsen.

Dong væntar, at ein royndarboring við Limfjørðin fer at kosta millum 30 og 35 milliónir krónur.

# Undir skurð í Italia

Fyrrverandi polski forsetin, Lech Walesa, varð fyrradagin lagdur undir skurð á einum sjúkrahúsi í Milano í Italia fyri hjartatrupulleikar.

Sambært polsku sendistovuni í Rom eydnaðist skurðviðgerðin so væl, at Walesa er longu farin aftur til Pólands. Sendistovan sigur, at upprunaliga skuldi Walesa leggjast undir skurð í Gdansk, men at viðgerðin bleiv flutt til Italia av praktiskum orsøkum.

Tann 63 ára gamli Lech Walesa skal ikki hava havt trupulleikar við hjartanum fyrr, og sambært polskum fjølmiðlum var støðan heldur ikki hættislig. Kortini mæltu læknarnir honum til at lata seg skurðvigera, skrivar AP.